# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Dánjal Vang heiðraður

Margretha drotning hevur heiðrað Dánjal Vang, lærara, við "for-tjenstmedaljen i sølv".

Uni Næs, skúlastýrisformaður, handaði Dánjal Vang, sum hevur verið lærari í Fuglafjarðar skúla í 40 ár, heiðursgávuna á kommunuskrivstovuni mikudagin 12. januar 2005.

Dánjal Vang verður heiðraður fyri trúgva og drúgva tænastu.

### Seinasta heilsan til
## Ingibjørg Eliasen



Góða Ingibjørg.

Tað er tungt fyri meg at skriva minningarorð um teg, eg fati tað ikki enn, at tú ikki longur er ímillum okkum.

Tú ert altíð í mínum tonkum, tað eru ikki miera enn tveir mánaðir síðan tú var ímillum okkum í Thabor, og tá vit høvdu basarin tann 12. november var tú eisini har, og 8. desember bleiv tú heimkallað, so tað gekk skjótt fyri seg.

Ingibjørg, tú var so trúgv í Thabor, so vit fara øll at sakna teg har. Eisini var tú so trúgv ímóti mær og mínum.

Tú var ein av teimum fáu nú á døgum, sum kom inn á gólvið við stokkum. Nú ein dagin eg var inni hjá tær legði eg til merkis, at tú føldi teg bangna, tí tú føldi teg ikki væl, men heldur illa. Tá bað tú meg biðja fyri tær. Men Gud, sum øllum valdar, hann hevði aðra meining við tær, tí hann vildi hava teg heim til sín. Og vit vita tað, at har hevur tú tað gott. Og har er lív hóast deyða.

*Takk for rósurnar á vegnum,*
*fyri tornar millum tær,*
*fyri lív við páskadegnum,*
*fyri Jesu fótafar!*
*Takk, Guð, fyri kross og krúnu,*
*fyri sigursæla stríð.*
*Fyri pláss við tína trónu,*
*takk, mín Guð, um alla tíð!*

Hvíl í friði.

**Justa**

### Dagurin

**14. januar. Felix**, deyður umleið ár 260. Prestur í Nola, nærhendis Napoli í Italia. Nógvar eru frásagnirnar um hansara lítillátna lív og tær mongu undirgerðirnar hann útinti.

Navnið merkir *eydnuríkur*.

Sosialurin 1 Fyrst við tí seinasta

Havnar leksikon:

# Nøvnini á konfirmantunum komin upp á pláss



*Í samband við at Birgar Johannessen í Havn savnar tilfar til eitt leksikon yvir Havnina í tíðarskeiðinum 1900-1969, var hendan myndin av konfirmantum í Havn 31. mars 1940 í Sosialinum 7. januar 2005. Við hjáp frá lesarum er nú øll nøvnini komin upp á pláss. Tey sum hava okkurt at viðmerkja eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 / 273168.*

*Aftasta rað f.v.: Jacob Frants Olsen, Peter Arne Rein, Johan Ejler Rubeksen, Daniel Ole Wang Hansen, Ole Oliver Justinussen, Ole Peter Lave Hansen, Mouritz Reynheim, Joen Henrik Petersen og Steingrím við Stein.*

*Miðraðið f.v.: Jacob Joensen provstur, Lars Aage Knudsen, Haldor Christian Christiansen, Frank Dam, John Justinussen, Ole Bjørn Viðstein, Bergtórur Bærentsen (Sund), Hans Jacob Hansen, Kaj Hansen, Ernst Reinert, Johannes Nicolaj Rubeksen, Trygve Árting, og Niels Pauli Justinussen.*

*Fremra rað f.v.: Leivur Nielsen, Hjalgrímur Jacobsen (Nólsoy), Svend Karsten Simonsen (Velbastaður), Elsebeth Sofie Stephansen, Johanne M. F. Petersen (Glyvrar), Aslaug Dam, Mildrid Dam, Anne Kathrine Højgaard, Hjørdis Thomsen (Nólsoy), Ásla Thomsen (Nólsoy), Birthe Ludvigsen, Erik Ludvigsen, og Eivind Olsen (á Lava).*

*Marie Jacobine Hansen vantar á myndini.*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*